

Kærleikin skal blóma ímillum føroysk ross

Serføroysku rossini, sum fyrr hava verið upp í 800 í tali eru nú bert 68 í tali.

Hetta ætlar Felagið Føroysk Ross sær nú at gera nakað við av álvara.

Tí fara tey nú í summar undir eina miðvíst átak fyri at fjølga um vakra og blíða føroysku rossini, sum tey kall tey.

Verkætlanin eitur »The Summer of Love« – og navnið merkir júst tað, sum tað leggur upp til, siga tey í Rossafelagnum

– Føroyar eiga eitt serligt rossaslag. Hetta er eitt serstakt slag, sum ikki er blandað ella í ætt við onnur rossasløg, siga tey.

Fyri 200 árum síðani var mett at tey vóru 800 í tali. Eftir at hetta talið minkaði í nærum einki var hildið at føroyska rossið var útdeytt.

Men so var ikki og í 1978 varð Felagið Føroysk Ross, stovnað.

Samstundis fingu tey vissu fyri, at slagið livdi enn og var ikki blandað við onnur rossasløg, sum tey stúrdu fyri.

Sostatt eiga vit eitt ross, sum ikki eigur sín líka í heiminum, siga tey í Felagnum Føroysk Ross .


Felagið Føroysk Ross fer í summar undir skipaða og miðvísa aling av føroyska rossinum. Tiltakið skal skunda undir nøringina og vøksturin av stovninum. Samstundis skal tiltakið skapa tilvitan og stoltleika í Føroyum um hetta serstaka rossaslag.

– Á fýra plássum kring landið, í Norðragøtu, Syðrugøtu, Signabø og á Kambsdali, skal kærleikin blóma, sigur rossafelagið.

Har er ætlanin at savna ross, sum síðani kunnu para seg undir væl skipaðum og neyvum og fakligum eftirliti, sigur felagið Føroysk.

aki@sosialurin.fo


Villige Villy



Villy Søvndal hjálpir løgmanni í avgerandi umfarinum móti ES

Í MORGIN


9/12 °C



Strúkur í vindi upp í hvassan vind av suðri og regn, seinnapartin nakað minni vindur av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt æli. Hitin millum 9 og 12 stig.

MIKUDAGIN


10/13 °C



Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og sólglottar, men eisini okkurt æli. Hitin milum 10 og 13 stig.

HÓSDAGIN

13/16°C




Fyrrapartin lot av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinapartin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og eitt skifti regn. Hitin millum 13 og 16 stig.

Veðrið fríggjadagin og leygardagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 18 stig.




Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið

LUFTTRÝSTIÐ



Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, 999 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað, men brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum.



Komandi nátt:
Eitt brúgvalag sunnanfyri Ísland fer í landnyrðing og dýpist til eitt lágtrýst, sum fer í landnyrðing millum Íslands og Føroya.

VESTFALLSKYRRINDI

7/7: Mánin longst frá jørðini
8/7: Tendring
16/7: Fyrra kvarter
21/7: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2013

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
14. juli	11:37	23:58	11:37	23:58	11:37	23:58	01:16	13:37	02:16	14:37	11:37	23:58	11:37	23:58	11:37	-	00:31	12:52	11:37	23:58	00:16	12:37
15. juli	-	12:20	11:20	23:41	11:20	23:56	01:58	12:20	02:58	12:20	10:20	22:56	09:20	21:56	00:13	12:20	01:13	13:20	-	12:20	00:58	12:20
16. juli	00:41	13:17	-	13:17	-	13:17	00:41	13:17	00:41	13:17	11:32	-	10:32	23:09	00:56	13:17	00:41	13:17	00:41	13:17	00:41	13:17
17. juli	01:54	14:32	01:54	14:32	01:54	14:32	01:54	14:32	01:54	14:32	01:54	14:32	11:47	-	01:54	14:32	01:54	14:32	01:54	14:32	01:54	14:32
18. juli	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36	03:10	15:36